# ítróttur

Nr. 38 • mikudagur • 22. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Føroyameistararnir spæla fyrst á Skála

**Fótbóltssambandið hevur gjørt uppskot um, hvussu tað skal spælast í Formuladeildini í 2006. Feløgini hava fingið møguleikan at gera viðmerkingar til kappingina, sum síðani verður løgd endaliga**


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*B36 spælir seinasta dystin í 2006 á útivølli ímóti GÍ, um uppskotið, sum FSF hevur gjørt um kappingarskipan fyri Formuladeildina, verður veruleiki*

Føroyameistararnir í B36 spæla fyrsta dystin í nýggju landskappingini á Skála, og B36 endar kappingina í Gøtu.

Hetta sæst í uppskotinum til nýggja landskapping, sum FSF hevur sent feløgunum at gera viðmerkingar til. Tá ið feløgini eru komin við sínum viðmerkingum, verður skráin fyri 2006 løgd endaliga.

Sambært uppskotinum hjá FSF verður fyrsti dysturin í Formuladeildini spældur sunnudagin 2. apríl. Tann stutti summarsteðgurin er frá 16. juli til 6. august, og kappingin endar leygardagin 21. oktober.

### Mest sunnudag

Dystirnir í Formuladeildini verða fyri tað mesta spældir sunnudagar og halgidagar, men tað eru tó dystir, sum verða spældir leygardag ella annan dag í vikuni.

Onkrir dystir verða framskundaðir orsaka av europeiskari luttøku, stevnudystir verða spældir leygardag, og harafturat eru onkrir dystir vikudagar – serliga í Eysturoynni, har seks lið eru við í bestu deildini.

Á páskum verða tvey umfør – Skírshósdag og Annan Páskdag.

Onkrir dystir millum stóru feløgini verða spældir mikudag – til dømis fyrsti dysturin ímillum HB og B36 og ein dystur ímillum KÍ og HB.

### Einki endabrak í Havn

Tosað hevur verið um at leggja heil umfør mitt í viku, men hetta verður ikki gjørt í uppskotinum hjá FSF.

Trupult er at leggja allar dystir í einum umfari mitt í viku, tá ið eitt Suðuroyarlið er við. Ferðingin til ella úr Suðuroy tekur longri tíð enn onnu ferðing, og tí er tað ein forðing fyri fleiri dystum mitt í viku.

Í fjør var stóri og avgerandi dysturin ímillum HB og B36 á seinasta leikdegnum. Í ár spæla hesi feløgini seinasta dystin sínamillum í fjórðsíðst umfari, um uppskotið hjá FSF verður veruleiki.

### FAKTA

Sambært uppskotinum hjá FSF er fyrsti dystur í Formuladeildini sunnudagin 2. apríl, og kappingin endar 21. oktober. Summarsteðgurin er frá 16. juli til 6. august.

**1. umfar, 2. apríl**
EB/Streymur-B68
GÍ-VB/Sumba
NSÍ-KÍ
HB-ÍF
Skala-B36

**27. umfar, 21. oktober**
HB-ÍF
EB/Streymur-KÍ
NSÍ-B68
Skála-VB/Sumba
GÍ-B36

## Ingi slapp ikki á vøllin

Ingi Højsted sat uttanfyri allar 90 minuttirnar, tá ið eykaliðið hjá Birmingham týskvøldið spældi ímóti eykaliðnum hjá West Bromwich. Dysturin endaði við 3-2 sigri til West Bromwich. Nýggi álopsspælarin hjá Birmingham, DJ Campbell, fekk umsíðir hol á sína málskjóting í hesum dystinum. Birmingham hevði fimm skiftisspælarar við til dystin, og venjarin brúkti tveir teirra. Ingi Højsted var ikki sendur á vøllin. 231 fólk hugdu eftir dystinum.

## Fremad javnleik uttan Andrew

Fremad Amager spældi týskvøldið venjingardyst ímóti HIK, og hesin dysturin endaði við javnleiki 1-1. Eftir stórsigurin á Stenløse í farnu viku, har Andrew av Fløtum skoraði hattrick, var saknur í føroyska landsliðsspælaranum í dystinum ímóti HIK. Fremad Amager kom aftur um longu í sjeynda minutti, men tað eydnaðist Mikkel Blavnsfeldt at javna, tá ið 22 minuttir vóru spældir. Fleiri mál komu ikki í dystinum, sum hevði 38 áskoðarar.

## Bárður við í USA

HB-málmaðurin Bárður Johannesen er farin við føroyska fótbóltslandsliðnum á venjingarlegu í USA. Ætlanin var, at ungi málmaðurin í Frem, Gunnar Nielsen, skuldi við á ferðina, men ein skaði forðaði fyri, at hann kundi fara avstað. Tí vóru boð send eftir Bárði Johannesen, sum sjálvur hevur havt skaða at stríðast við í ár, men sum nú er klárur at spæla aftur.

## Føroyingar ikki í sjónvarpið

TV3 og 3+ hava nú valt dystirnar, sum rásirnar fara at senda í teimum fyrstu fýra umførunum av superliguni í vár. Tað eru serliga dystirnir hjá FC Keypmannahavn og Brøndby, sum verða vístir, og eingir føroyskir landsliðsspælarar verða at síggja í hesum dystum. Hvørki AaB ella AC Horsens eru millum liðini, sum verða send beinleiðis á TV3 og 3+ fyrstu fýra umførini.

# Tromsø klárt til hálvfinalur

**Flogbóltsliðið Tromsø vann um vikuskiftið teir báðar seinastu dystirnar í grundspælinum. Liðið hjá Rúna Weihe og Bárður B. Mikkelsen er nú klárt til hálvfinalurnar**


FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Tromsø endaði sum nummar 2 í grundspælinum í bestu norsku flogbóltsdeldini hjá monnum.

Um vikuskiftið vóru tveir teir seinastu dystirnir í grundspælinum á skránni, og Tromsø vann báðar dystirnar.

Leygardagin var mótstøðuliðið Førde, og Tromsø vann tryggan 3-0 sigur. Settúrslitini vóru 25-22, 26-24 og 25-19.

Servurnar vóru góðar, og álopsspælið gekk væl í hesum dystinum.

Sunnudagin spældi Tromsø í Bergen, har mótstøðuliðið var Nyborg. Hendan dystin vann Tromsø 3-1 við settúrslitunum 21-25,25-11, 25-19 og 25-18.

Eftir eitt vánaligt fyrsta sett, tók Tromsø sær um reiggj og sat fullkomiliga á restini av dystinum.

### Klárir til hálvfinalur

Tromsø endaði sum nummar 2 í grundspælinum. Bara Kristiansund var frammanfyri liðið hjá Rúna Weihe og Bárður Bendix Mikkelsen.

Harvið er Tromsø komið beinleiðis í hálvfinalurnar, og Tromsø skal spæla ímóti vinnaranum av dystinum ímillum Randaberg og Nyborg.

Fyrra hálvfinalan hjá Tromsø verður á útivølli 11. mars.